Umhvørvismálaráðið

Dagfesting:	29. sep. 2025
Mál nr.:	25/24822-1
Málsviðgjørt:	ARØ/SDJ
Ummælistíð:	N/A
Eftirkannað:	19.09.2025

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um trygging móti avleiðingunum av arbeiðsskaða (Arbeiðsskaðatryggingarlógin)
(Lækka inngjaldið til Vinnusjúkugrunnin og víðka virkisøkið hjá Vinnusjúkugrunninum)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 67 frá 25. mai 2009 um trygging móti avleiðingunum av arbeiðsskaða (Arbeiðsskaðatryggingarlógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 48. frá 8. mai 2012, løgtingslóg nr. 51 frá 12. mai 2015, løgtingslóg nr. 108 frá 10. oktober 2023 og løgtingslóg nr. 40 frá 25. mars 2025, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 78, stk. 1, verður aftan á 1. pkt. sum nýtt pkt. sett:
"Vinnusjúkugrunnurin virkar somuleiðis fyri upplýsing um vinnusjúkur og fyribyrging av vinnusjúkum."

2. Í § 78, stk. 4, verða 2. og 3. pkt. orðað soleiðis:
"Inntøkur grunsins skulu nýtast til endurgjald fyri vinnusjúkur, sum eru fráboðaðar í árinum, útreiðslur til umsiting, heruppií kostnað til Vanlukkutryggingarráðið, virksemi, sum hevur til endamáls at upplýsa um og fyribyrgja vinnusjúkum, og til avsetingar til tiltakspeningin."

3. Í § 79, stk. 2 og 3, verður "0,10%" broytt til: "0,05%".

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2026.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar


1.1. Orsakir til uppskotið

Nevndin í Vinnusjúkugrunninum hevur í 2023 og aftur nú víst Umhvørvismálaráðnum á, at kapitalgrundarlagið hjá Vinnusjúkugrunninum er meira enn nøktandi, og at í verandi støðu savnar grunnurin pening saman.


Í 2023 gjørdi nevndin í Vinnusjúkugrunninum vart við, at grunnurin hevði eitt nøktandi kapitalgrundarlag, og í táverandi støðu megnaði grunnurin størri sveiggj í avsetingum og møguligt økt tal av endurgjøldum. Flutt úrslit tilsamans árini 2010-2023 vóru tá 34,3 mió. kr.

Ársroknskapurin fyri 2024 vísir, at gongdin heldur fram, og grunnurin uppbyggir enn kapital. Orsøkin er í høvuðsheitinum, at árligu inngjøldini á hvørjum ári eru hægri enn leypandi útgjøldini, og avsetingarnar tykjast nú liggja í eini meira støðugari legu. Ársroknskapurin fyri 2024 vísir eitt avlop á 15,6 mió. kr. Inngjøldini til grunnin vóru 12,8 mió. kr. og útgoldin endurgjøld fyri vinnusjúkur vóru 0,9 mió. kr. Avkastið frá íløgurøkt var 6,5 mió. kr. Flutt úrslit tilsamans síðan 2010 eru 79,5 mió. kr., og innskotin tiltakspeningur er 30 mió. kr. Aktiv tilsamans vóru 129 mió. kr. við árslok 2024. Sí talvurnar niðanfyri.

Inngjøld og útgjøld 2015-2024 (tkr.)



Eginogn og avsett til endurgjøld 2015-2024 (tkr.)



Nevndin metir ikki, at tað er neyðugt at halda fram við at økja um kapitalgrundarlagið. Grunnurin megnar størri sveiggj í avsetingum og møguligt økt tal av endurgjøldum við verandi kapitalgrundarlagi. Tá eru atlit tikin at, at útgjøldini í 2023 og 2024 helst eru ávirkað av drúgvari málsviðgerðartíð hjá Vanlukkutryggingarráðnum. Mett verður, at árligu útgjøldini fara at liggja millum 4 og 6 mió. kr. í miðal frameftir.

Nevndin í Vinnusjúkugrunninum hevur mælt landsstýriskvinnuni til antin at lækka inngjaldið í helvt í t.d. fimm ár í fyrsta umfari ella at niðurkapitalisera við innskotna tiltakspeninginum, sum er 30 mió. kr. Fortreytirnar, sum eru nýttar sum grundarlag fyri at lækka inngjøldini, eru, at roknað verður við, at útgjaldið til leypandi veitingar næstu árini verður á leið á sama støði sum miðal fyri árini 2016-2021, og at sveiggini í avsetingum komandi árini ikki verða munandi størri enn tær broytingar í avsetingum, sum hava verið seinastu 10 árini.

Yvirlit yvir broytingar í avsetingum árini 2015-2024

Ár	tkr.	Lýsing
2015	16.052	Meginreglan fyri útrokning av avsetingum varð broytt.
2016	8.762	Fleiri útgjøld frá eldri árum.
2017	-5.155	Færri leypandi veitingar og færri ikki avgreiddir skaðar.
2018	6.662	Fleiri útgjøld enn væntað á eldri skaðum.
2019	10.277	Tríggjar leypandi veitingar til ung fólk við høgari veiting.
2020	-4.357	Tvær størri leypandi veitingar steðgaðar og færri útgjøld frá eldri skaðum.
2021	-5.827	Tvær størri leypandi veitingar steðgaðar.
2022	-4.273	Minni sannlíkt er, at gjaldast skal fyri gamlar skaðar.
2023	-14.023	Broytt mynstur í viðgerðartíð og útgjaldi verður tikið fult við í metingina.
2024	1.830	Hægri avseting fyri ikki avgreiddar skaðar og lægri fyri leypandi veitingar.

1.2. Galdandi lóggáva

Vinnusjúkugrunnurin er ein almennur grunnur, sum tó hevur eina serliga støðu, við tað at útreiðslurnar hjá grunninum ikki skulu játtast á løgtingsfíggjarlógini, og at fæið í grunninum ikki er partur av gjaldførinum hjá landskassanum.

Leiðslan fyri grunnin er ein nevnd við trimum limum, sum landsstýrisfólkið velur fyri fýra ár í senn. Ein limur umboðandi arbeiðstakararnar, ein umboðandi arbeiðsgevararnar, og ein sum skal hava búskaparligan ella løgfrøðiligan førleika. Nevndin er annars óheft av landsstýrisfólkinum. TAKS umsitur Vinnusjúkugrunnin, og Føroya Vanlukkutryggingarráð tekur avgerðir um endurgjald fyri vinnusjúkur.

Endamálið hjá Vinnusjúkugrunninum er at fíggja og rinda endurgjald fyri vinnusjúkur sambært § 10 í løgtingslógini.

Kapitalgrundarlagið hjá Vinnusjúkugrunninum er eitt innskot á 30 mió. kr. frá landskassanum umframt gjald frá øllum arbeiðsgevarum og sjálvstøðugum vinnurekandi. Arbeiðsgevaragjaldið er 0,10% av útgoldnum A-inntøkum, meðan gjaldið hjá sjálvstøðugum vinnurekandi er 0,10% av skattskyldugu inntøkuni av sjálvstøðuga vinnuvirkseminum frá undanfarna inntøkuári. Sum umrøtt omanfyri metir nevndin fyri Vinnusjúkugrunnin, at kapitalgrundarlagið hjá grunninum er meira enn nøktandi, og tí hevur nevndin mælt til at minka inngjaldið við eini helvt.

Inntøkurnar og fæið í grunninum er markað til neyvt ásett endamál og kann ikki verða nýtt til annað. Tørvur er tó á betri hagtølum á økinum eins og upplýsandi tilfar um vinnusjúkur kundi verið betri.

Umhvørvismálaráðið skal viðmerkja, at ongin innkrevjingarskipan er til at krevja gjaldið frá teimum sjálvstøðugu vinnurekandi. Í royndum rinda tey sjálvstøðugu vinnurekandi tí onki í Vinnusjúkugrunnin. Ætlanin er at viðgera hendan spurningin seinni.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við lógaruppskotinum er at minka lógarkravda inngjaldið hjá arbeiðsgevarum og sjálvstøðugum vinnurekandi úr 0,10% niður í 0,05%. Arbeiðsgevarar rinda nevnda prosentpart av útgoldnum A-inntøkum, meðan sjálvstøðug vinnurekandi rinda nevnda prosentpart av skattskyldugu inntøkuni frá seinasta inntøkuári. Inngjaldið verður lækkað til tess, at Vinnusjúkugrunnurin ikki skal uppbyggja størri kapital enn neyðugt til tær útreiðslur, hann hevur.

Harumframt verður skotið upp at víðka virkisøkið hjá Vinnusjúkugrunninum eitt vet, soleiðis at Vinnusjúkugrunnurin eisini skal virka fyri upplýsing og fyribyrging í sambandi við vinnusjúkur. Tørvur er nevniliga á fleiri og betri hagtølum fyri vinnusjúkuøkið í Føroyum. Tá ið viðkomandi greiningar eru gjørdar, verður eisini tørvur á at gera viðkomandi upplýsandi tilfar, sum møguliga kann vera við til at tálma ella fyribyrgja framtíðar vinnusjúkum í Føroyum.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Lógaruppskotið hevur við sær, at inngjaldið til Vinnusjúkugrunnin minkar við eini helvt. Ítøkiliga ber hetta við sær, at gjaldið, sum arbeiðsgevarar og sjálvstøðug vinnurekandi rinda í Vinnusjúkugrunnin, verður lækkað úr 0,10% niður í 0,05% av ávikavist útgoldnum A-inntøkum og av skattskyldugum inntøkunum frá sjálvstøðugum vinnuvirksemi. Við støði í

inngjøldum í 2024 merkir hetta eina samlaða sparing til arbeiðsgevarar og sjálvstøðug vinnurekandi á umleið 6,4 mió. kr. árliga.

Harumframt hevur lógaruppskotið við sær, at Vinnusjúkugrunnurin umframt at fíggja og rinda endurgjald fyri vinnusjúkur eisini skal virka fyri upplýsing í sambandi við vinnusjúkur og fyribyrging av vinnusjúkum. Lógaruppskotið hevur við sær bæði eina formliga og eina fíggjarliga heimild fyri víðkaða virkseminum hjá Vinnusjúkugrunninum.

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Lógaruppskotið hevur ikki verið til ummælis.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri fíggjarlógina, tí at lógarbundnu inntøkurnar og útreiðslurnar og avkast av ognarrøkt hjá Vinnusjúkugrunninum verða ikki tiknar við á løgtingsfíggjarlógina.

Tó hevur uppskotið við sær, at almennu arbeiðsgevararnir, bæði land og kommunur, fara at rinda helvtina minni enn nú í Vinnusjúkugrunnin. Fyri land verður hendan sparingin mett at vera umleið 1,6 mió. kr. og fyri kommunur umleið 1 mió. kr. árliga.

Lógaruppskotið hevur við sær, at inntøkurnar til Vinnusjúkugrunnin verða lægri. Við støði í inntøkunum hjá Vinnusjúkugrunninum í 2024, sum vóru 12,8 mió. kr., kann væntast, at inntøkurnar verða uml. 6,5 mió. kr. framyvir.

Hesi síðstu tíggju árini hevur inngjaldið verið munandi hægri enn útgjøldini úr grunninum. Fíggjarliga megin verður mett at vera nøktandi bæði í mun til verandi støðu og við atliti at møguligum sveiggjum í útgjøldunum.

Víðkanin av virkisøkinum hjá Vinnusjúkugrunninum fer at hava við sær øktar útreiðslur, í tann mun nevndin fyri Vinnusjúkugrunnin ger av at brúka nýggju heimildina at virka fyri upplýsing um og fyribyrging av vinnusjúkum.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar við sær fyri land og kommunur.

Lógaruppskotið fer at hava nakað av umsitingarligum avleiðingum fyri nevndina í Vinnusjúkugrunninum, sum fer at skula virka fyri upplýsing í sambandi við vinnusjúkur og fyribyrging av vinnusjúkum.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Lógaruppskotið hevur jaligar fíggjarligar avleiðingar fyri arbeiðsgevarar og sjálvstøðug vinnurekandi, sum skulu gjalda lægri gjald til Vinnusjúkugrunnin.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar á økinum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Mett verður ikki, at lógaruppskotið er í ósamsvari við Hoyvíkssáttmálan, evropeiska mannarættindasáttmálan, EMRS, ella sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

2.9. Markaforðingar
Lógaruppskotið hevur ikki markaforðingar við sær.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir og ger ikki onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um skattir og avgjøld.

2.12. Gjøld
Talan er ikki um at áseta nýtt gjald í lógaruppskotinum, men verandi gjald verður skorið niður í helvt.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið leggur ikki skyldur á likamligar ella løgfrøðiligar persónar.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrisfólkið, stovn undir landsstýrisfólkinum ella til kommunur at áseta nærri reglur. Lógaruppskotið víðkar tó endamál Vinnusjúkugrunsins, so at endamálið umframt at vera at figgja og rinda endurgjald fyri vinnusjúkur eisini fer at fevna um upplýsing í sambandi við vinnusjúkur og fyribyrging av vinnusjúkum. Í hesum sambandi skal kunngerð nr. 160 frá 17. desember 2009 um viðtøkur fyri Vinnusjúkugrunnin endurskoðast, soleiðis at nærri reglur verða ásettar um hetta víðkaða virksemið hjá Vinnusjúkugrunninum.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn uttan rættarúrskurð.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur aðrar avleiðingar enn omanfyri tilskilað.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri plass ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Ja	Nei	Nei	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Nr. 1
Sambært § 78, stk. 1, í løgtingslógini er endamálið hjá Vinnusjúkugrunninum at fíggja og rinda endurgjald fyri vinnusjúkur sambært § 10. Skotið verður upp at seta eitt punktum inn afturat í § 78, stk. 1, sum víðkar endamálið eitt vet, soleiðis at Vinnusjúkugrunnurin eisini skal virka fyri upplýsing og fyribyrging í sambandi við vinnusjúkur.

At Vinnusjúkugrunnurin skal virka fyri upplýsing um og fyribyrging av vinnusjúkum ber t.d. við sær:

- Kunnandi tilfar til læknar og kommunulæknar, sum sambært § 24, stk. 3, í løgtingslógini hava fráboðanarskyldu til Vanlukkutryggingarráðið og aðrar avvarðandi eftirlitsstovnar um allar tilburðir, sum teir í yrki sínum gerast varugir við, kunnu vera vinnusjúkur.
- Lýsingarátøk rættað mótvegis arbeiðsgevarum og løntakarum.
- Hagtøl um vinnusjúkur í Føroyum.
- Geva fíggjarligan stuðul til verkætlanir, gransking, tiltøk o.a., sum snúgva seg um vinnusjúkur.

Vinnusjúkugrunnurin hevur avtalu við TAKS um umsiting, tvs. bókhald, inngjald og útgjald og tílíkt. Grunnurin hevur ikki dagliga leiðslu ella skrivastovu, ið kann arbeiða við hagtølum ella kunnandi tilfari. Ætlanin við at víðka virkisøkið hjá Vinnusjúkugrunninum er, at grunnurin kann nýta inntøkur grunsins til at keypa hesar tænastur eftir tørvi, gera samstarv við aðrar viðkomandi myndugleikar og fíggja útreiðslur í hesum sambandi. Hugsað verður í fyrstu atløgu um at fáa til vega hagtøl um vinnusjúkur. Harnæst at brúka hagtølini til at gera viðkomandi greiningar og upplýsandi tilfar, sum kunnu gagna arbeiðsmarknaðinum.

Nr. 2
§ 78, stk. 4, í løgtingslógini snýr seg um inntøkur grunsins, og hvat hesar skulu nýtast til. Inntøkurnar hjá Vinnusjúkugrunninum verða nýttar til veitingar fyri skaðar, sum eru hendir í árinum, útreiðslur til umsiting, heruppií kostnað til Vanlukkutryggingarráðið, og avsetingar til tiltakspeningin. Ítøkiliga verður rindað fyri veitingar sambært løgtingslógini, so sum útreiðslur í sambandi við sjúkuviðgerð, uppvenjing og hjálpartól o.a. undir málsviðgerðini, endurgjald fyri mist vinnuføri, skaðabót fyri varandi mein, skiftisveiting til eftirsitandi, endurgjald fyri miss av uppihaldara og m.a. útreiðslur hjá Vanlukkutryggingarráðnum til sakkøna hjálp, útreiðslur til læknaváttanir, ferðaútreiðslur, mista inntøku o.a. í sambandi við málsviðgerðina hjá Vanlukkutryggingarráðnum.

Sum ein avleiðing av broytingini í nr. 1 omanfyri um víðkanina av virkisøkinum hjá Vinnusjúkugrunninum verður skotið upp at skoyta nýggja virkisøkið upp í ásetingina, um hvat inntøkurnar hjá grunninum verða nýttar til. Sostatt verður skotið upp, at inntøkur grunsins eisini verða nýttar til virksemið, sum hevur til endamáls at upplýsa um og fyribyrgja vinnusjúkum.

Sum nevnt omanfyri, er ætlanin, at grunnurin kann nýta inntøkur grunsins til at keypa tænastur eftir tørvi, gera samstarv við aðrar viðkomandi myndugleikar og fíggja útreiðslur í sambandi við framleiðslu og viðgerð av kunnandi og fyribyrgjandi tilfari.

Broytingin av virkisøkinum hjá Vinnusjúkugrunninum hevur við sær, at kunngerð nr. 160 frá 17. desember 2009 um viðtøkur fyri Vinnusjúkugrunnin skal endurskoðast. Kunngerðin hevur heimild í § 78, stk. 8, í løgtingslógini, sum ásetur, at landsstýrisfólkið ásetur nærri reglur um viðtøkur grunsins.

Broytingin í § 78, stk. 4, hevur harumframt tvær tekniskar broytingar við sær. Fyrra tekniska broytingin er, at í § 78, stk. 4, 2. og 3. pkt., er eitt punktum ov nógv. Við lógarbroytingini verður hetta rættað, soleiðis at punktumið verður til komma.

Hin tekniska broytingin er ein nágreining av orðingini "veitingar fyri skaðar, sum eru hendir í árinum". Ásetingin snýr seg um Vinnusjúkugrunnin, og Vinnusjúkugrunnurin hevur sum endamál at rinda endurgjald fyri vinnusjúkur, meðan tað eru tryggingarfeløgini, sum rinda fyri veitingar í sambandi við arbeiðsskaðar annars sambært løgtingslógini. Orðið "skaðar" í løgtingslógini merkir sambært § 8 bæði *vanlukka* sambært § 9 og *vinnusjúka* sambært § 10. Við lógarbroytingini verður hetta nágreinað, soleiðis at tað stendur: "endurgjald fyri vinnusjúkur, sum eru fráboðaðar í árinum", so at ongin ivi er um, at talan er um vinnusjúkur og ikki aðrar arbeiðsskaðar.

Nr. 3

Nevndin fyri Vinnusjúkugrunnin hevur gjørt landsstýriskvinnuna varuga við, at kapitalgrundarlagið í Vinnusjúkugrunninum er meira enn nøktandi. Nevndin hevur tí mælt til at lækka inngjaldið í grunnin í eina helvt t.d. í fimm ár. Landsstýriskvinnan hevur tikið hetta til eftirtektar, og við hesum verður skotið upp at lækka lógarkravda gjaldið, ið allir arbeiðsgevarar og sjálvstøðug vinnurekandi skulu rinda í Vinnusjúkugrunnin úr 0,10% niður í 0,05%. Gjaldið verður rindað av ávikavíst øllum útgoldnum A-inntøkum og av skattskyldugari inntøku frá sjálvstøðugum vinnuvirksemi.

Í royndum eru tað bara arbeiðsgevararnir, sum rinda í Vinnusjúkugrunnin, tí at ongin innkrevjingarskipan er at krevja gjaldið inn frá teimum sjálvstøðugu vinnurekandi. Ætlanin er at viðgera tann spurningin seinni.

Hóast nevndin hevur mælt til at vísa varsemi og lækka gjaldið við eini helvt í t.d. fimm ár, verður ongin tíðaravmarking ásett í lógaruppskotinum. Mett verður, at tað er skilabetri, at støða aktivt verður tikin til, um tørvur er á at broyta gjaldið aftur, tá ið ein tíð er frá liðin.

Broytingin hevur við sær, at inntøkurnar hjá Vinnusjúkugrunninum, sum støðugt eru vaksnar síðan 2019, minka í helvt. Um so verður, at útgjaldið til leypandi veitingar næstu árini verður á leið á sama støði sum miðal fyri árini 2016-2021, og sveiggini í avsetingum komandi árini ikki verða munandi størri enn tær broytingar í avsetingum, sum hava verið seinastu 10 árini, verður mett, at kapitalgrundarlagið hjá Vinnusjúkugrunninum við hesi broytingini fer at liggja í eini støðugari legu, har inngjøld og útgjøld fara at javnviga nøkulunda. Tó ber sjálvsagt ikki til at siga fram í tíð, hvussu gongdin við vinnusjúkum fer at verða.

Til § 2

Áseting um gildiskomu.

Umhvørvismálaráðið, 29. september 2025

Margit Stórá
landsstýriskvinna

/ Pól E. Egholm

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur